# 1894-1913

## 1. oktober 1894

var fyrsti fundurin hjá nýggja kommunustýrinum. Meðan flestu kommunustýrisfundir nú á døgum verða hildnir seinnapart á degi ella um kvøldið, var hesin fyrsti fundurin settur kl. 9 um morgunin.

Í fyrsta kommunustýrinum sótu: Grækaris Joensen, Hanus Joensen, Jesar Abrahamsen og J. Kruse av Eiði og Johan Nysted av Norðskála.

Grækaris Joensen varð valdur til formann og J. Kruse til næstformann.

Á fyrsta fundinum varð skattaálíkning gjørd og arbeiðsbýti millum bygdaráðslimirnar. Johan Nysted skuldi krevja inn skattin í Svínáum, við Norðskála og á Oyri, meðan Hanus Joensen, í Pálsstovu, skuldi krevja skattin inn fyri Eiði og Ljósáir. Jesar Abrahamsen varð valdur at standa fyri vegarbeiði.



*Grækaris Joensen var fyrsti sóknarstýrisformaður.*

Mannagongdin gjørdist eisini hon, at teir, sum umboðaðu Svínáir, Norðskála og Oyri í sóknarstýrinum, komu at taka sær av innkrevjingini har suðuri.

Kommunustýrisfundirnir vóru ikki tættir. Næsti fundur var 28. desember sama árið og síðani ikki aftur fyrrenn 24. juni árið eftir.

Áhugavert er at síggja, at fundardagurin varð ásettur, áðrenn sóknarstýrislimirnir skiltust, og at ásetti dagurin varð hildin.

## Brúgv um Breiðá

Vóru fundirnir ikki tættir, so vóru tó – eftir tátíðarmeting – rættiliga stórar avgerðir tiknar.

Longu á næsta kommunustýrisfundi, í juni 1895, varð samtykt at senda løgtinginum umsókn um studning til gerð av brúgv um Breiðá, sum við hvørt verður nevnd Mylnáin, av tí at ein mylna stóð niðarlaga í ánni, stutt oman fyri Breiðásand.

Tvey ár ganga, áðrenn svar kemur viðvíkjandi umsóknini. Í september 1897 fær kommunustýrið at vita, at løgtingið hevur samtykt, at brúgvin um Breiðá skal gerast, og at „Færø Amts økonomiske Fond" vil rinda ein hóskandi part av kostnaðinum, tá

ið nágreinilig rokning frá kommunustýrinum er komin og váttan um, at brúgvin er forsvarliga gjørd.

## Grannskoðari

Sum fyrsti grannskoðari í kommununi var Jógvan Christiansen settur á sóknarstýrisfundinum 21. desember 1895. Jógvan hevði lítlan handil í húsunum á Mýruni.

## Skúlabygging við Norðskála

Á fundinum 24. juni 1896 fær kommunustýrið at vita, at statskassin hevur játtað 1400,- kr. „til hjælp ved opførelse af en skolebygning i Nordskaale".

## Sjórættarlimir

Í juni 1897 verður kommunustýrið av amtinum biðið um „at udpege mindst 2 i kommunen bosatte mænd til atter at beskikke til søretsmedlemmer istedetfor kjøbmand J. Kruse og tømmermand Joen Poulsen, begge af Ejde, der begge udtræder efter tur ved udgangen af dette år."

Men av tí at hesir báðir einki hava ímóti at halda áfram sum sjórættarlimir, velur kommunustýrið teir til hetta álitisstarv eitt skeið aftrat.

## Læraraviðurskifti

Grækaris Joensen, sum gjørdist fyrsti kommunustýrisformaður á Eiði, var læraralærdur. Hann var fyrsti næmingur, ið tók lærarapróg v í Føroyum, og fyrsti lærari við føroyskum lærarapróg vi, ið hevur fingið læraraembæti her.

Úr bókini „Lærarafólk í Føroyum 1870-1956" verður setanarbræv hansara frá Færø Amts skoledirektion prentað, og verður tað endurgivið her:

*Færø Amts Skoledirektion.*
*Thorshavn, den 8de Juni 1871.*

*Da der i Bygden Eide er oprettet en Skole og Betingelserne for at samme kan træde i Virksomhed nu ere tilveiebragte, bliver der herved efter Underviisningskommissionens Indstilling meddelt Gregers Joensen af Eide Constitution som Lærer ved bemeldte Skole, og vil der i denne Egenskab, under Forudsætning af Bevilling ved Finansloven og saalænge Beboerne yde ham de efter Kommissionens Skrivelse af 19de f.M. vedtagne Bidrag, blive ham tillagt en aarlig Løn af 100rd af Statskassens Bidrag til Skolevæsenet, fra 1st d.M. at regne, der udbetales ham maanedsviis forud ved Amtet imod hans Kvittering.*

*Til Bekræftelse under Skoledirectionens Underskrift og Segl*

*H. Finsen. cst. V.U. Hammershaimb.*

*Segl*

*Constitution for*
*Gregers Joensen af Eide*
*som Lærer ved den sammesteds oprettede Skole. –*

Grækaris Joensen var føddur á Eiði 14. desember 1835. Foreldur hansara vóru: Jógvan Joensen, óðalsbóndi, og Marin Malena Joensen, bæði av Eiði.

Hann fór á læraraskúla í Havn í 1870, haðani hann tók læraraprógv í apríl í 1871.

1. juni verður hann fyribils settur sum lærari á Eiði, og 16. januar 1877 fekk hann fast lærarastarv har. Hann var lærari á Eiði til deyða sín 12. juni 1897, 52 ára gamal.

## Nýggjur lærari

Niels Østerø, ið hevði virkað sum lærari, síðani Grækaris doyði, varð um leið hálvt ár seinni settur sum lærari á Eiði.

Hann var sonur Absalon Guttormsen, lærara og kongsbónda á Trøllanesi, og var føddur í 1876.

Niels var ikki leingi lærari á Eiði. Longu fyrst í oktober 1897 mátti hann fara úr starvi. Hann doyði í mars 1902. Hann stovnaði sangfelag á Eiði og virkaði dúgliga fyri fráhaldssøkini. Í árinum 1900 helt hann fólkafund á Eiðisskarði. Meðan Niels Østerø var lærari á Eiði, hevði hann møti fyri børnum saman við Óla úti í Stovuni, tað vit í dag høvdu kallað sunnudagsskúli. Hetta vistu bæði Jóhan í Djónastovu og Anthon í Durhúsi at greiða frá.

## J. Kruse verður kommunustýrisformaður

Eftir deyða Grækarisar tekur næstformaðurin, Jens Jørgen Kruse, við sum formaður.

Á næsta kommunustýrisfundi, sum varð hildin 29. september 1897, verður samtykt ikki at velja nýggjan kommunustýrislim fyri Grækaris Joensen, av tí at tíðin er so stutt, til nýtt val verður.

## Nýtt kommunustýri

23. juli 1897 standa teir báðir kommunustýrislimirnir Jesar Abrahamsen og Johan Nysted fyri vali. Johan verður afturvaldur, meðan Heini Nygaard, keypmaður, kemur inn ístaðin fyri Jógvan Poulsen.

## Brúgvin um ánna við Norðskála

Á fundi 29. september verður skriv frá Færø Amt lisið upp. Har verður sagt frá, at løgtingið hevur samtykt at áleggja kommunustýrinum at seta brúnna um ánna í Norðskála í tryggan stand.

## Umhvørvisvinaligt kommunustýri

24. juni í 1900 tekur nýtt kommunustýri við á Eiði. Umframt Heina Nygaard, Johan Nysted og Jógvan Poulsen, sum sótu frammanundan, eru Óli Ellingsgaard, Óli í Køkinum, og Niels Kruse, nývaldir.

Heini Nygaard gerst formaður og Niels Kruse næstformaður.

Ikki kann sigast, at umhvørvisvinaliga hugsanin er nýtt fyribrigdi, tí á hesum sama fundi verður samtykt, at Heini Nygaard „påser renligheden paa stranden."

## Fyribilslærari

Í skrivi frá „skoledirektionen" verður boðað kommunustýrinum frá, at Johannes Hans Petersen er settur sum fyribilslærari frá 1. juli 1901 til 30. september 1902.

13. november 1902 er kommunustýrisfundur, har presturin, ið er formaður í skúlanevndini, er hjástaddur.



*Henda myndin av Eiði er helst tikin um aldaskiftið.*



*Johannes Hans Petersen, lærari.*

Einasta mál á skránni er um setan av Jóhannesi Hans Petersen í fast lærarastarv á Eiði. Samtykt varð at innstilla hann til lærarastarvið.

Johannes Hans Petersen var føddur í Svínoy í 1874. Hann var sonur Hans Peter Heinesen, bónda, og Elisabeth, fødd Olsen, í Svínoy.

Johannes Hans Petersen var lærari á Eiði til 1. juli 1915, tá hann varð settur lærari í Svínoy. Hann var kommunustýrislimur á Eiði í fleiri ár. Hann var heilsuveikur maður og doyði í februar 1930, bert 56 ára gamal.

## Garðsbáturin gongur burtur

Tíðliga ein junimorgun í 1901 fór bóndin

í Garði, Óli Ellingsgaard, saman við soninum, Jóan Peturi, ið var giftur, Pól Johansen, í Britustovu og Andreas Dam Andreasen úr Kollafirði, búsitandi á Eiði, til gongu til Funnings og vóru haðani settir yvirum til Elduvíkar.

Á heimleið settu teir inn við Gjógv, tí ein ár var brotnað. Teir vóru inni hjá Jóhan í Nýggjustovu og hildu síðani leiðina fram til Eiðis, men komu ongantíð fram.

Horvni báturin varð seinni afturfunnin, men eingin av einkjunum vildi hava hann aftur til Eiðis.

Jóhannes í Britustovu, eisini nevndur Eiðis-Jóhannes og sum var sonur Pól, hevur greitt frá, at hann var eftir torvi henda dagin saman við onkrum av systkjum sínum. Tá ið tey komu heim ímóti bygdini, sóu tey bátin út fyri Mølini og sóu hann ganga undir í Ritaskorunum – heim ímóti Risanum. Oftani gingu tey oman á Stallin fyri at síggja bátin koma undan Torvanesi, men eingin bátur kom fram.

Hildið verður, at Garðsbáturin er kollsigldur við Risan.

Greta í Britustovu, einkjan eftir ~~Pól~~ Á. Dam Andreasen, hevði eina tunga lagnu.

Fyrst í august – trý ár eftir vanlukkuna við Garðsbátinum, var hon farin burtur í torv í Grønunum, við Eiðisvatn, við synunum Georg, sum var 13 ára gamal, og Niels, sum var 9 ár. Systkinabarn dreingirnar, Erik Dam úr Havn, sum ferðaðist norðuri á Eiði, var eisini við teimum.

Veðrið var gott, og dreingirnir fingu hug

*Útsýni úr Tjørnuvík út í Flógvan, Risan, Kellingina og Eiðiskoll.*



at fara útí, og mamman gav loyvi. Hvørgin dugdi at svimja, og teir fóru útí á einum tí vánaligasta staðnum, teir kundu havt valt sær, tí har var marbakki. Tann yngri beiggin fór fyrst útí, men hann hevði ikki vaðsað meira enn nøkur fá stig, tá skar hann í róp og fór undir. Tann eldri beiggin, sum tá var liðugur at lata seg úr, leyp eftir honum, men fór eisini til botns.

Erik Dam, sum stóð og læt seg úr, leyp nú útí eftir dreingjunum, men heldur ikki hann dugdi at svimja. Hann hættaði sær ikki út av marbakkanum, fekk bert fatur á øðrum beininum á øðrum dreinginum, men misti takið.

Hann rópti neyðarróp. Mamman og ein eldri eiðiskona, sum eisini var í torvi, og tveir aðrir dreingir komu til hjálpar. Mamman sá dreingirnar stríðast fyri lívinum. Hon ætlaði sær at leypa útí eftir synunum, men eldra konan fekk forðað henni.

Í einum neysti nærhendis hevði Kruse keypmaður ein prám standandi. Tey flotaðu prámin, og samstundis fór tann eldra konan skundisliga heim í bygdina eftir hjálp. Mamman og teir tríggir dreingirnir sóu teir báðar liggja á botni. Tey royndu at fáa fatur á teimum við árunum, men tær rukku ikki niður á botn. Tá eiðismenn komu til hjálpar, var ov seint. Allar royndir at fáa lív í teir báðar dreingirnar vóru nyttuleysar. Vestarlaga í kirkjugarðinum hevur dupultur krossur staðið á grøv teirra.

Greta í Britustovu var hart rakt. Tá ið hon var blaðung genta, druknaði pápi hennara og tveir brøður samstundis. Við Garðsbátinum misti hon mannin og beiggjan, sum æt Pól, síðani hesar báðar dreingirnar, og sama árið datt mammubeiggi hennara oman.

Greta livdi ikki leingi eftir hetta. Dóttirin Olivia og sonurin Hans Martin fóru til eina mostur í Kvívík at vera. Hans Martin, sum gjørdist ein gamal maður, fekk at kenna ein stóran sorgarleik aftrat øllum hinum, honum høvdu verið fyri á ungum árum. Fýra av synum hansara vóru við Stella Argus, sum fórst norðan fyri Føroyar í oktober 1957. Teir vóru: Andrass, Niels, Ólavur og Tórður.

## Jarðarmóðir

15. august er fundur á Eiði, har samtykt verður at innstilla Elin Poulinu Kristinu Hansen, 29 ár, gift Jóan Magnus Hansen, í Andrasstovu, til at læra til jarðarmóður.

Suðuroyar-Elin, sum hon vanliga varð nevnd, var ættað úr Froðba. Maður hennara, Jóan Magnus, gekk við posti til Funnings og Gjáar í mong ár. Við Gjógv og í Funningi varð hann róptur „Posturin".

Á tí eina fundinum var M. Samuelsen, Mikkjal í Vík. Hann umboðaði „Forstanderskabet for de forenede Sogne i Nordstrømø", sum sostatt eisini stóð aftan fyri tilmælið av jarðarmóðurini.

Jóhanna Poulsen hevði higartil virkað sum jarðarmóðir. Hon var av Eiði, men mátti fara frá vegna sjúku.

## Læknafundur í Vík

6. september 1902 varð boðað til fundar í Vík. Innbjóðararnir eru „De forenede Sogne i Nordstrømø". Við á fundinum vóru eisini „De forenede Sogne i Østerø".

Endamálið við fundinum er at tala saman um at fáa ein lækna settan, sum skal hava bústað á Eiði.

Tvey ár seinni kemur skriv um, at løg-

tingið kann lata kr. 6.000,- í láni til bygging av læknahúsum á Eiði, og at hetta lánið skal vera rentufrítt.

Eiðis kommunustýri tók av hesum tilboði.

Um hetta mundið var Eiði undir Vestmanna læknadømi, har læknin var búsettur.

Eitt ár eftir fundin í Vík hevur ynski um lækna á Eiði ikki vunnið frama.

Men 3. oktober 1906 kemur skriv frá Amtinum um læknamálið, og á fundi, sum varð hildin á Eiði 24. apríl 1907, møta hesir: Ole Olsen, kommunustýrislimur úr Vík, Petur Petersen, kommunustýrislimur úr Funningi, Ulrik Kristiansen, Petur Kristian Joensen, kommunustýrislimur við Gjógv, Sámal Samuelsen, Petur Kruse, Herman Mørkøre, Poul Poulsen, Bærint Jacobsen og Óli Olsen av Eiði.

Ólavsøkuaftan í 1910 samtykkir kommunustýrið á Eiði enn einaferð at heita á myndugleikarnar um at skunda undir læknasetanina á Eiði.

7. oktober 1911 er aftur fundur á Eiði um læknamálið. Formaðurin í kommunustýrinum í Funningi var ikki á fundi, men kommunustýrisformaðurin í Vík var á fundi saman við Eiðis kommunustýri.

Á hesum fundinum varð samtykt, at allar tríggjar sóknirnar skuldu vera felags um útreiðslurnar.

19. juni 1912 var felagsfundur á Eiði, har formaðurin í kommunustýrinum á Eiði, Johannes Hans Petersen, tvey umboð fyri felagskommunurnar í Norðurstreymoynni og kommunustýrisformaðurin í Funningi, P.C. Joensen, vóru møttir.

Endamálið við fundinum var at innstilla annan av teimum báðum umsøkjarunum til læknastarvið á Eiði.

Semja var um at innstilla Gudmund Effersøe. Í grundgevingini fyri at innstilla hann fram um ein dana, ið eisini søkti, verður sagt, at hann er føddur í Føroyum og var her sum smádrongur, og at hann tí helst megnar føroyska málið. Hetta varð hildið at vera neyðugt fyri læknan, sum skuldi setast í starvið, tí royndirnar hava prógvað, at læknin og sjúklingar hava misskilt hvør annan, av tí at fólk ikki hava megnað danska málið.

Við hesum grundgevingunum verður samstundis inniliga heitt á myndugleikarnar at seta Gudmund Effersøe í starvið sum lækni á Eiði.

Samstundis verður viðtikið at biðja um, at ein praktiserandi lækni verður settur fyri Eiði, Víkar og Funnings sókn. Eisini verður heitt á løgtingið um at lata tær umrøddu kr. 6.000,- í láni til bygging av læknahúsunum á Eiði til afturgjaldingar í 30 ár, goldið við kr. 200,- árliga – umframt rentur. Eiðis kommunustýri skal gjalda tríggjar fimtapartar, Víkar og Funnings kommunustýri sín fimtapart. Harumframt skuldi Eiði lata 2.400 tímar sum pliktarbeiði til byggingina av læknahúsunum.

Árliga løn læknans skuldi vera kr. 3.000,-. Av hesum skuldi tað almenna rinda helmingin. Hinar kr. 1.500,- skuldi hann fáa til vega frá fólki sum læknagjald. Men um her kom at resta í, skuldu tey trý kommunustýrini rinda tað.

Seinni kemur skriv frá felagskommununum í Norðurstreymoy um, at tær hava samtykt, at tær hava tað ynski, at umrødda 6.000,- krónu-lánið skuldi vera rentufrítt.

Gudmund Effersøe, lækni, kom til Eiðis 21. oktober 1912.



*„Krusapakkhúsið" og neyst niðri á Hamri.*

## Telefonfundur

25. oktober 1905 verður kommunustýrið kallað saman til eykafundar í sambandi við skriv frá Amtinum um at seta á stovn telefonstøð á Eiði.

Samtykt varð at kanna, um eitt hóskandi høli kundi fáast til leigu og at finna onkran, sum kundi átaka sær at passa telefonina.

Sambært einum skrivi frá Amtinum eitt ár seinni er hvørki høli ella fólk fingið til vega. Eitt umsóknarblað frá Amtinum um at fáa eina telefonstøð á Eiði er eftir øllum at døma burturblivið og ongantíð komið fyri á kommunustýrisfundi. Hetta er møguliga ein av orsøkunum til seinkanina av telefonini.

Í 1907 verður boðað frá, at løgtingið hevur samtykt, at taksturin fyri telefonsamtalu er 13 oyru og fyri fjarrit 10 oyru.

Á kommunustýrisfundi 15. desember 1913 samtykti sóknarstýrið at lata Ole Olsen, Óla í Jógvansstovu, passa telefonina á Eiði fyri 80 kr. árliga og Joen Nysted 25 kr. um árið fyri at passa telefonina við Norðskála.

## Hvalastøðirnar við Áir og Gjanoyri

Í juni 1905 kemur skriv frá landfútanum og E. Müller í Havn viðvíkjandi bygging av hvalastøð við Áir.

Í skrivi frá Amtinum sama ár skilst, at tað er „Dansk Hvalfangst og fiskeriaktieselskab", sum letur hvalastøðina byggja við

Áir, og at hesir binda seg til at selja hvalatvøst til eysturbygdirnar á Streymoynni, vesturbygdirnar á Eysturoynni og Nólsoyar bygd.

Í sambandi við upprudding av burturkasti frá hvalastøðum sendi Amtið í september kunningarskriv til Eiðis kommunustýri um reglur viðvíkjandi hesum.

Kommunustýrið skrivar aftur og ger vart við, at reglurnar ikki áleggja hvalastøðini á Gjanoyri nakra skyldu at gjalda uppruddingina av burturkasti, sum haðani kemur rekandi norður í fjøruna á Eiði.

## Nýggj vatnleiðing

Tá ynskiligt er at bøta um vatntrotið í bygdini, samtykkir kommunustýrið á fundi í juni 1908 at heita á Ludvig Poulsen í Havn um at gera eina kostnaðarmeting av eini vatnleiðing úr Breiðá suðuri við Eiðisvatn til bygdina.

Á kommunustýrisfundi í september verður kostnaðarmetingin hjá Ludvig Poulsen løgd fram. Tilfarið til vatnleiðingina kom at kosta kr. 5.721,-.

Arbeiðið upp á vatnleiðingina varð helst liðugt fyrst í 1910.

Umframt rokningina frá Ludvig Poulsen vóru eisini rokningar frá Valdemar Lützen fyri timbur og sement og frá útihandlinum hjá Mortensen á Eiði og Krusehandlinum. Kr. 6.000,- vórðu tiknar í láni í Føroya Banka í sambandi við vatnleiðingina.

## Rúsdrekkaforboð

Kommunustýrið sendi Amtinum skriv, dagfest 28. apríl 1911, har sagt verður, at „Forstanderskabet i Ejde Sogns Kommune har vedtaget, at man med lov skal forbyde al indførsel til Færøerne af berusende drikke."

## Lærari í Sundalagnum

Í 1912 er spurningurin frammi um at seta ein lærara aftrat, men kommunustýrið heldur tað vera ov kostnaðarmikið í løtuni at seta ein lærara við útbúgving, men heldur seg kunna arbeiða fram ímóti, at ein útbúgvin lærari verður settur í Sundalagnum frá 1. januar 1913, og sum skal undirvísa 15-18 tímar um vikuna fyri 50 kr. um árið, treytað av, at státurin letur hinar 50 krónurnar.

Presturin og kommunustýrisformaðurin fáa upp í hendi at finna rætta persónin til lærara.

Eftir tilmæli frá A. Joensen, presti, varð norðskálakonan E.B. Hansen sett sum ólærd lærarinna.

## Forboð móti línufiskiskapi

24. juni 1914 er til ummælis bræv frá sýslumanninum og Amtinum um forboð fyri línufiskiskapi um veturin og um várið. Kommunustýrið heldur, at fiskimenninir sjálvir eiga at gera av, nær teir nýta snøri ella línu.